Stendur á trappuni við shampoo í hárinum. Ókeypis brúsa og fønari, ikki so gali í Føroyum.

**Maður, 45 ár**

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

# Mjólamjarr



*Eg taki eitt rúsevni. Tað eitur Charlie Sheen.*

Sjónleikarin Charlie Sheen er í andglettinum í USA



*Vit mugu fortelja fólki, hvat gransking og menning kann gera fyri okkum og samfelagið.*

Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, vil hava meira kunning um gransking (Sosialurin)

Hví missa menn hárið ?

**Kvinna, 51 ár**



*Lívið snýr seg ikki um at sleppa undan storminum, men um hvussu tú dansar í regninum.*

Countrystjørnan Taylor Swift hugleiðir um lívið.

Var hjá lækna í dag fyri at sleppa at verða stiriliseraður, men fyrst skal stiriliseringsnevndin taka avgerð um eg sleppi. Stiriliseringsnevnd!? Hvør segði persónligt frælsi? Síggi tað fyri mær. Ja, í dag skulu vit so viðgera umsókn frá Terji. Hvør stemmar fyri?

**Maður, 44 ár**



*Eg haldi meg hava roynt nóg mikið til at koma fyri meg.*

Fótbóltsspælarin Rógvi Jacobsen gevur skarvin yvir og gevst at spæla fótbólt (Sosialurin)

Ein kann sikkurt finna skriftstøð, sum legalisera at velja allar flokkar. Vit fáa at vita: "Ver yvirvøldini lýðin" (also vel sambandið) - Prædikarin sigur: "Hjarta dárans stevnir til vinstru, og hjarta hins vísa til høgru" (also vel fólkaflokkin). Orðtøkini siga: "Halt ikki av, hvørki til vinstru ella høgru" (also vel sjálvstýrisflokkin). Ápostlasøgan skrivar, at tey fyrstu kristnu býttu alt sína millum (also vel javnaðarflokkin). Aðrastaðni stendur at lesa, at Harrin skapti tjóðirnar (also vel tjóðveldi). Og "Kadima" merkir "Framsókn" á hebraiskum, so vit kunnu væl finna "kristilig" argument fyri at velja allar flokkar.

**Maður, 43 ár**



*Summir bjóða sær at venja hundin, aðrir bjóða sær at passa seyðin, og uppaftur aðrir siga, hvussu nógvar milliónir teir eiga.*

Arnfríð Hentze, bóndi í Sumba, fær nógv tilboð frá mannfólki (Rás2)



*Tað hevði ikki verið løgið, um tað hevði verið ein sivilisatión á Mars, men kanska hava kapitalisman og imperialsman gjørt av við hana.*

Hugo Chavez, forseti í Venezuela (Reuters)